FYLGISKJAL 2

LM-050/2025

MIÐLASTUÐULSNEVNDIN

8. oktobur 2025

Almanna- og mentamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um miðlastuðul

Samanumtikið tekur Miðlastuðulsnevndin undir við lógaruppskotinum. Nevndin hevur tó nakrar viðmerkingar til uppskotið.

Viðvíkjandi íverksetanarstuðul

Nevndin tekur undir við, at miðlastuðulin til ítøkiligar verkætlanir verður avtikin. Hesin stuðul hevur ikki tænt tað endamál, ið hann skuldi. Nevndin tekur tó ikki undir við, at har í staðin skal vera ein íverksetanarstuðul. Ásetingin tykist at vera eitt avrit frá donsku lógini um miðlastuðul (lov om mediestøtte). Spurningur má setast við, um slíkur stuðul hóskar seg til føroysk viðurskifti. Hetta í mun til støddina av Føroyum og nøgdina av miðlum, ið eru í Føroyum í forvegin. Nevndin metir, at man eigur at raðfesta at styrkja verandi miðlar. Nevndin mælir tí til, at hava eina skipan, har 100% av játtanini til miðlastuðul fer til skjalprógvaðar lønarútreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu.

Um Almanna- og mentamálaráðið framhaldandi metir, at har skal vera ein íverksetanarstuðul, so eigur ráðið at umhugsa, um stuðulin skal vera heili 40% av samlaðu játtanini. Hartil kann sigast, at tað í § 6 í lógaruppskotinum verður sett so mikið høg krøv til eginfiggingina hjá einum miðli, at íverksetanarstuðulin í veruleikanum er avmarkaður til miðlar, ið longu hava nógvan kapital, og ikki heilt smáar íverksetanarfyritøkur. Tí má spurnartekin setast við, um tað er neyðugt, at ein nýggjur tíðindamiðil, sum væntandi í forvegin hevur lutfalsliga stóran kapital, fær ein so stóran part av samlaðu játtanini til miðlastuðul.

Sum nevnt metir nevndin, at man eigur at raðfesta at styrkja verandi miðlar og góðskuna hjá teimum, heldur enn at stovna nýggjar miðlar.

Viðvíkjandi tilknýti og ognarviðurskifti - § 2, stk. 2 í uppskotinum

Viðvíkjandi § 2, stk. 2 í uppskotinum um tilknýti, so metir nevndin, at núverandi § 2, stk. 2 er betri, greiðari og sterkari orðað. Núverandi orðing ljóðar soleiðis:

> *"Miðlastuðul verður heldur ikki latin teimum í § 1, stk. 1 nevndu miðlum, um viðkomandi miðil, heilt ella lutvíst, beinleiðis ella óbeinleiðis umvegis ognarviðurskiftini ella umvegis tætt tilknýti annars ikki hevur tann neyðuga greiða skilnaðin við miðil, ið hevur fingið ella hevur søkt um stuðul í sama stuðulsári, soleiðis at skilja, at miðlarnir ikki eru at meta sum sínámillum sjálvstøðugir".*

Nýggja orðingin ljóðar soleiðis:

> *"Umframt avmarkingarnar sambært stk. 1 verður miðlastuðul ikki latin tíðindamiðlum, sum við helvtini ella meiri er ogn hjá arbeiðsgevarafeløgum, arbeiðstakarafeløgum, vinnugreinafeløgum ella áhugafeløgum, undir hesum politiskum feløgum o.lík.".*

Nevndin metir, at nýggja uppskotið til § 2, stk. 2 er linari enn verandi orðing, sum ikki er ynskiligt. Við nýggju orðingini skal man eiga minst helvtina av einum miðli, áðrenn tilknýti er ov tætt. Váði er fyri, at orðingin letur upp fyri spekulatión, har fleiri miðlar t.d. sláa seg saman, og harvið eiga partar av einum øðrum miðli. Men so leingi at ongin eigur helvtina ella meira, so ávirkar ásetingin ikki hesir miðlar, og kunnu teir tí fáa stuðul. Nevndin metir, at tað skal vera heilt greitt, at um tað onkursvegna ikki er greiður skilnaður ímillum miðlar og ognarviðurskifti teirra, at so skal ikki vera gjørligt hjá báðum (ella fleiri) miðlum at søkja um stuðul. Við nýggja uppskotinum er váði fyri, at stuðul til ymiskar miðlar fara í sama lumma. Mælt verður tí til, at varðveita verandi orðing, ella umorða § 2, stk. 2 í uppskotinum á ein hátt, sum ikki letur upp fyri spekulatión.

<u>Útrokning av rakstrarstuðli - § 3 í uppskotinum</u>

Í mun til hvussu rakstrarstuðulin skal býtast, so ljóðar verandi áseting í § 4, stk. 2 soleiðis:

> *"Harumframt verða 30% av árligu játtanini á figgjarlógini <u>latin sum ein eins lutfalslig upphædd í prosentum</u> av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli ella miðlasamtaki."*

§ 3 í nýggja uppskotinum ljóðar soleiðis:

> *"60% av árligu játtanini á figgjarlógini til miðlastuðul verður latin teimum í § 1 nevndu tíðindamiðlum <u>sum ein eins upphædd í prosentum</u> av samlaðu, skjalprógvaðu útreiðslunum til beinleiðis journalistiska framleiðslu hjá viðkomandi tíðindamiðli ella miðlasamtaki árið fyri umsóknarárið."*

Nevndin ivast í, hvørt tað var ætlanin at strika orðið "*lutfalsliga*" upphædd, og um hetta hevur ávirkan á, hvussu stuðulin skal útroknast?

MIÐLASTUÐULSNEVNDIN

Beinleiðis journalistiska framleiðslu

Nevndin metir tað vera skynsamt, at tað verður nágreinað í serligu viðmerkingunum til § 3, stk. 1, at forritan av KT-palli og líknandi til miðilin, skrivstovuhald, fyrisiting, o.s.fr. ikki verður mett at vera útreiðslur til beinleiðis journalistiska framleiðslu, soleiðis at ongin ivi er hesum viðvíkjandi.

Ein miðil fær stóran part av rakstrarstuðlinum - § 4, stk. 2, seinna pkt.

Í verandi miðlastuðulslóg er ásett í § 4, stk. 2, seinna pkt. at: "*Ein miðil ella miðlasamtak kann í mesta lagi fáa 40% av teimum 30% av árligu játtanini á fíggjarlógini, ið er sett av til stuðul við støði í skjalprógvaðum lønarútreiðslum sbrt. 2. pkt.*". Ásetingin er ein trygd fyri smærru miðlarnar. Uttan slíka áseting er váði fyri, at teir stóru miðlarnar tøma rakstrarstuðulin, harvið at tað verður minni stuðul til smærru miðlarnar.

Nevndin undrast á, hví slík áseting ikki er við í nýggja uppskotinum, og mælir til, at ein líknandi orðing verður løgd afturat. Undanfarnu ár hava tað nevniliga verið miðlar, ið hava rakt loftið á 40%, har stuðulin síðani er minkaður, og smærru miðlarnir tí eisini fingið hægri stuðul, enn teir annars høvdu fingið.

Vegna Miðlastuðulsnevndina,

Vinaliga,

Lív Krogh Arge
Forkvinna